# Húsadreymurin gjørd

## Saman við aspesti, fýri, svampi, vatnskaðum og fukti fekk vónríka barnafamiljan ekstremt drál, bóndafangarí og til endans eina stevning uppá nakkan, tá tey fóru út á villa húsamarknaðin



*Vit mugu aftur til summarið 2006, tá Unn Paturson og Rógvi á Rógvi, sangarinna/bókavørður og trummuspælari/lærari, settu sær fyri at finna eitt reiður til lítlu familjuna at búleikast í*

BRÚKARAMÁL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Saman við lítlu didduni, situr hon við køksborðið undir loftsvindeyganum og blaðar í einari tjúkkari pappírsrúgvu. Ovast liggur ein stevning, og higartil síðsta kapitlið í ræðusøguni um húsakeypið hjá Unn og Rógva.

– Eg skilji bara yvirhøvur ikki, hvussu tað kundi koma so vítt. Vit hava sitið føst í hesum húsakeypinum síðani september í 2006, og nú eru vit í januar 2008, sigur 32 ára gamla Unn Paturson, sum er sett at eiga um eina viku ella so.

Hóast hon og maðurin 38 ára gamli Rógvi á Rógvi á pappírinum eru húsaeigarar, so búgva tey enn í lítlu loftsíbúðini hjá foreldrum hennara. Har hava tey nú í meiri enn eitt ár sitið og spurt seg sjálvi, hvussu tey so dyggiliga kundu blíva bóndafangað í einari skipan, har húsakeyparar onga trygd hava, meklaravirkini onga ábyrgd og seljarar ongan moral.

Samstundis standa húsini enn og spøkja úti í Vesturbýnum í Havn: Bølamyrk, dýggjvát og ísakøld, full av aspesti og fýri, ógjørlig at búgva í - seld teimum fyri 2 milliónir krónur.

– Vit siga ikki, at øll meklaravirki eru líka óálítandi sum hetta. Vit siga heldur ikki, at allir seljarar eru líka ágangandi sum hesir. Og vit siga heldur ikki at øll hús, ið eru bygt beint aftaná kríggið eru full í aspest. Men hetta er fyrstu ferð vit keypa hús, og tey fýra árini, vit hava leitað eftir onkrum at búgva í, er húsaprísurin hækkaður umleið eina millión. Og vit hava kent okkum alt meira desperat, greiðir Unn Paturson frá. Og hon nevnir eitt nú, hvussu tað kendist, tá hon var millum onnur, og fólk sótu og prátaðu um støðuna á húsamarknaðinum.

– Tað skar í hjartað, tá fólk sótu og reypaðu av, at tey høvdu keypt hús fyri 400.000 krónur undir kreppuni, sum nú vóru 2,5 milliónir verd. Og har sat eg og panikkaði og føldi tað, sum vóru vit komin ov seint til lívið, og at tað bara vóru vit í øllum landinum, sum vóru í hesari støðuni, sigur Unn og vísir stevningina uppá 250.000 kr. frá teimum báðum monnunum, sum seldu teimum aspest-húsini.

Men hvussu kundi tað koma so vítt?

Vit mugu aftur til summarið 2006, tá Unn Paturson og Rógvi á Rógvi, sangarinna/bókavørður og trummuspælari/lærari, settu sær fyri at finna eitt reiður til lítlu familjuna at búleikast í. Og áðrenn Unn fer undir drúgvu frágreiðingina, leiðir hon dóttrina Eyð Lín inn í lítlu loftsstovuna at hyggja í sjónvarp.

### Lygnin

Áhugin fyri húsunum verður kveiktur av einari lýsing á heimasíðuni hjá meklaravirkinum Húsamekling á sumri í 2006: Hús í Havn í tveimum hæddum frá umleið 1945. Grundstykkið 500 fermetrar. Verða seld, um nøktandi boð verður givið.

Longu fáar dagar seinni vísir eitt umboð fyri meklaravirkið teimum runt í húsinum. Av tí, at ongin støðulýsing er, seta tey eina rúgvu av spurningum.

– Vit hava tá hugt eftir fleiri húsum, og ongantíð hevur borið til at fáa eina óhefta støðulýsing. Marknaðurin er jú soleiðis innrættaður, at húsini verða seld óansæð, sigur Unn, og hon greiðir frá, at tey millum annað spyrja umboðið fyri meklaravirkið, hvørjum tilfari húsini eru av, og um aspest er í teimum.

- Og hann svarar, at tey eru úr sement og at veggirnir ikki eru tær eldfimu "bleytu" pláturnar, sum hann tekur til, sigur Unn.

Sæð í bakspeglinum er tað longu her, gølan tekur skap, tí, sum hon sigur:

- Eg haldi veruliga ikki, vit vóru meira naiv enn onnur fólk. Vit ganga út frá at meklarin er kompetentur og hevur sett seg eitt sindur inn í, hvørja vøru hann selir. Nú dugi eg væl at síggja, at tað alla tíðina bara hevur snúð seg um at fáa lortið selt, sigur Unn. Og hon heldur, at tey hava ikki verið býttari enn aðrir keyparar, tí, sum hon sigur, í flestu førum er alt í lagi. Men tað er bara ikki nóg mikið, tá alt ikki er í lagi. Tá eru vit brúkarar prísgivnir.

– Mann gongur líkasum útfrá, at ein, sum slær seg niður sum húsameklari, eisini hevur ávísar førleikar og ein ávísan fakligan stoltleika, og at tey upplýsa rætt um vøruna, tey selja.

### Fleiri lygnir

Eini 5-6 fólk leiga kømur í húsinum. Tí er beinanvegin greitt, at nakað av arbeiði skal til, áðrenn tey verða búgvandi í. Tríggir veggir mugu takast burtur, annar so tey fáa eina stovu. Køkurin er gamal og slitin og má, eins og baðiverilsið, skiftast út.

– Men okkum dámar væl húsini, halda tey vera sjarmerandi. Og so hóska tey væl til okkara tørv, millum annað tí har er ein tilbygningur, sum vit kunnu innrætta til tónleikahøli, greiðir Unn frá.

Tvær ferðir vitja tey húsini saman við umboði frá meklaravirkinum, og tá verður eisini greitt frá, at nakrar serligar umstøður eru í mun til matrikuleringina av stykkinum. At seljararnir, sum hava keypt ognina við víðarisølu fyri eyga, ætla at sundurmatrikulera stykkið í trý, so teir kunnu selja tvey grundstykkir við vinningi, umframt húsini við stykkinum á til Unn og Rógva. Tey spyrja meklaran, um teirra grundøkið so framvegis verður 500 fermetrar, sum upplýst í sølutilfarinum. Hesum játtar meklarin, sum tó leggur afturat, at alt stykkið líka skal matrikulerast liðugt, so skapið verður kanska eitt lítið sindur øðrvísi.

Um hetta mundið verður eisini upplýst, at seljararnir ynskja 1,9 milliónir fyri húsini.

### Bakka út

Onki boð er komið uppá húsini, sum longu hava staðið leingi til sølu. So Unn og Rógvi leggja fyri við at bjóða 1,6 milliónir kr. Hesum taka seljarnir tó ikki av, tí tað er ov lítið. Teir vilja hava 1,9 millión. Tey meta nú, at umvælingarnar fara at kosta einar 200.000 kr., bjóða tí 1,9 millión, sum seljarin vil hava. Tvær vikur ganga, og boðið gongur út. Onki annað boð er komið. So Unn og Rógvi vænta sær játtandi svar. Men enn einaferð er svarið noktandi. Seljarnir taka ikki av boðnum. Hetta er fyrst í september 2006. Meklarin sigur nú, at bjóða tey 2,1 milliónir kr., so fáa tey húsini – heilt sikkurt.

– Hetta ganga vit ikki við til. Kenna okkum hildin fyri gjøldur, tí ongin annar hevði jú bjóðað upp á húsini, sum hava staðið á sølulistanum so leingi. So vit gera av at droppa tað, greiðir Unn frá.

### Venda við aftur

Húsaprísirnir eru um hetta mundið støðugt vaksandi um alt landið, serliga í Havnini, har teir síggja út til at hækka fyri hvønn dag.

- Eftir at hava hugt og bjóðað upp á hús og grundøkir í miðstaðarøkinum í meira enn trý ár, kenna vit okkum rættiliga desperat eftir at fáa eitt hús, sigur Unn.

Aftaná eina tíð er enn onki nýtt boð komið upp á húsini.

- Vit síggja nú hetta sum okkara einasta møguleika at fáa nakað at búgva í í Havn, og velja tí at geva okkara seinasta boð upp á húsini: 2 milliónir. Hetta er tað, vit kunnu klára av lánsútreiðslum um mánaðin.

Vit eru enn í september 2006, og umvegis meklaran taka seljararnir nú av.

– Okkara fyrsti spurningur er sjálvandi, nær vit sleppa inn. Og meklarin svarar, at tá ið grundøkið er liðugt matrikulerað um einar tríggjar vikur.

### Fyrireika flyting

Leigarar eru enn í húsinum, og skulu út áðrenn Unn og Rógvi sleppa inn. Men meklarin spyr nú vegna seljaran, um hesin kann halda fram við at leiga út fram til jóla og sjálvur fáa leiguinntøkurnar. Hetta góðtaka Unn og Rógvi, og saman við triára gomlu Eyð Lín, fara tey undir fyrireikingarnar, at flyta inn í egin hús, eftir fimm ár heima hjá foreldrunum.

Eitt fyribilskeyti verður undirskrivað, tí matrikuleringin av grundstykkinum er ikki liðug, og málið er enn til viðgerðar á matrikulstovuni og hjá kommununi.

– Vit vildu sleppa inn at gera nakrar broytingar, sum vit ætlaðu okkum. Men hetta bar ikki til, tí matrikuleringin var ikki liðug, sigur Unn.

Hvørja ferð tey tosa við meklararnar, eru boðini, at tað verður klárt um eina viku. Og tey ringja eina ferð um vikuna at frætta, men hvørja ferð eru boðini, at endaliga skeytið verður klárt at skriva undir í næstu viku. Ikki

